# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 09.12.2019 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Poul Laust Christiansen
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Janus Thomsen

1. **Avtala við Landsverk um tunnilsgrót:**
Uppskot komið frá Landsverk um avlopsgrót frá Hvalbiartunlinum. Hvalbiar Kommuna kann fáa tunnilsgrótið koyrt út á Bíargarð fyri kr. 19,58 im3. Talan er um uml. 35.000 im3, sum skal koyrast út á Bíargarð.
**Fíggjarnevndin 09.12.19:**
Nevndin samd um við 2 atkvøðum fyri at mæla bygdaráðnum til at samtykkja avtaluna.
**Avgerð:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum frá fíggjarnevndini.

2. **Bátahylur á Hamranesi – innkomið tilfar og tilboð.**
**Vega- og havnanevndin 08.11.19 og 15.11.19:**
Nevndin hevur arbeitt við málinum í longri tíð og fingið øll loyvir til verkætlanina uppá pláss og metir nevndin at málið er búgvið til støðutakan. Nevndin mælir einmælt at taka av tilboðnum frá Articon á kr. 3.845.386 u/mvg og at fíggja hettar við lántøku.
**Fíggjarnevndin 09.12.19:**
Eftir at Vega- og havnanevndin hevur arbeitt við bátahylinum á Hamranesi í longri tíð, hevur Fíggjarnevndin eisini umrøtt tann kostnaðarliga partin av málinum: 3 tilboð innkomin frá:
1: Articon kr. 3.845.386,- u/mvg.
2 : J&K á kr. 4.993.551,- u/mvg.
3: RTS á kr. 5.809.292,- u/mvg.
Samtykt varð við 2 atkvøðum fyri at mæla bygdarráðnum at taka av tilboðnum frá Articon á kr. 3.845,386,- u/mvg.

**Avgerð:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum frá nevndinum og taka av tilboðnum frá Articon kr. 3.845.386,- u/mvg.

3. **<u>Innkomið tilboð uppá plastsperru frá Trolvirkinum Bergið</u>: (Janus luttók ikki í viðgerðini av hesum máli og fór út av fundinum og inn kom eykalimur Hans Cecil Poulsen)**

**Vega og havnanevndin 03.12.19:**
Tilboðið frá Berginum uppá plastsperru er áljóðandi: 155.000,00 kr. uttan mvg. Uppsetan er við í prísinum.
Vega- og havnanevndin mælir til, at vit taka av tilboðnum frá Berginum.
**Fíggjarnevndin 09.12.19**
Fíggjarnevndin samtykt við tveimum atkvøðum fyri at taka av tilboðnum frá Berginum á kr. 155.000,-.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

4. **<u>Innkomin tilboð uppá bátabrúgvar</u>: (Janus luttók ikki í viðgerðini av hesum máli og fór út av fundinum og inn kom eykalimur Hans Cecil Poulsen)**

**Vega og havnanevndin 09.12.19:**
Vega- og havnanevndin hevur fingið trý tilboð uppá bátabrúgvar til nýggja bátahylin á Hamranesi. Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá S.J.H. Commercial Divers kr. 3.446,500 u/mvg.
**Fíggjarnevndin 09.12.19.**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið har 3 tilboð eru innkomin:
1: Bergið hevur ein vegleiðandi prís á kr. 2.000.000,- u/mvg og uttan fragt, uppseting og annað.

| | |
|---|---|
| 2: S.J.H. Commercial Divers | kr. 2.988.500,- |
| Trædekk á | kr. 278.500,- |
| Vatn, elsteyrar og gjaldstøð á | kr. 179.500,- **við** montering |
| Tilsamans frá S.J.H Commercial Divers | kr. 3.446.500,- uttan mvg. |
| 3: Pontech á | kr. 1.950.000,- |
| Motering við meiri á | kr. 950.937,- |
| Trædekk á | kr. 175.000,- |
| Vatn, elsteyrar og gjaldstøð á | kr. 147,424- **uttan** montering |
| Tilsamans | kr. 3.223.361,- u/mvg |

Samtykt var at lata bygdarráðið taka avgerð í málinum á fundinum í kvøld.
**Avgerð:**
Samtykt við 6 atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum frá Vega- og Havnanevndini og taka av tilboðnum frá S.J.H. Commercial Divers kr. 3.446,500 u/mvg.

5. **<u>Byggisamtyktin viðvíkjandi broyting í tekstinum: </u>(Janus Thomsen kom inn aftur á fundin og Hans Cecil fór av fundinum)**
   **Avgerð:**
   Samtykt einmælt at taka undir við broytingini í tekstinum i byggisamtyktini.

6. **<u>Innkomin kostnaðarmeting uppá umvæling av linolium gólvum í Hvalbiar skúla</u>:**
   **Trivnaðarnevndin 03.12.19:**
   Nevndin mælir til at taka av kostnaðarmetingini, sum húsavørðurin, Claus Olsen hevur fingið til vega.
   **Fíggjarnevndin 09.12.19:**
   Húsavørður, Claus Olsen hevur innheintað kostnaðarmeting til umvæling av gólvi í Hvalbiar Skúla á kr. 63.400 v/mvg. Nevndin samtykti einmælt at mæla bygdaráðnum til at játta hesar pengar til 2019, tá øll játtanin til skúlan ikki er nýtt.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum frá nevndunum og játtta peningin.

7. **<u>Eykajáttan 2019 – 2. viðgerð</u>:**
   **Fíggjarnevndin 09.12.19:**
   Eykajáttanin fyri 2019 á kr.1.813.000,- varð gjøgnumgingin. Nevndin hevur ongar viðmerkingar til umsóknina um eykajáttan.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

8. **<u>Uppskot til kommunustýrisfundir 2020:</u>**
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.25

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Poul Laust Christiansen

Gunnhild Mortensen Rúni Thomsen Sten Spange Larsen

Hans Cecil Poulsen
(til mál nr. 3 & 4)